# Klaksvíksfamilja í



## Arbeiði í útlandi



**Jan Müller**
jan@sosialurin.fo

Altjóðagerðin er av álvara komin til Føroya eisini. Boð eru eftir føroyskari arbeiðsmegi í útlandinum. Ella rættari eftir búskaparfrøðingi við olju sum speciali til risafyritøku í Geneve í Sveis. Tey hepnu eru Tummas Pauli Mýri og konan Martha, sum seinastu árini hava búð í Klaksvík saman við børnunum, Malan 6, Jákup 4 og Anna Louisa 1 ár, og sum nú fara til hetta ævintýrkenda og spennandi alpulandið at arbeiða og búgva í komandi 2 til 3 árini.

Hví koma til Føroya eftir búskaparfrøðingi, nú Europa klekir túsundtals slíkar á hvørjum ári! Svarið er einfalt: Havnarmaðurin Teitur Poulsen var headhuntaður til oddastarv í svensku fyritøkuni Lundin Petroleum, sum hevur sítt høvuðssæti í Sveis. So væl hevur gingið hjá honum, at leiðslan í oljufyritøkuni, sum er verd 20 milliardir krónur, sendi boð eftir enn einum føroyskum búskaparfrøðingi at umsita og virðisøkja stóru virðini.

– Eg helt tað ljóðaði ómetaliga spennandi at royna hetta starvið, nú eg jú havi drúgvar royndir í oljuvinnuni sigur ein blíður og spentur Tummas Pauli, nú hann riggar til at fara av landinum og leggja leiðina til Geneve. Seinni kemur restin av familjuni. Konan verður so heimaarbeiðandi at byrja við, nú smábørn eru í barnaflokkinum.

### Fortíðin kemur væl við

Tað er so ikki minst fortíðin hjá Tummas Paula, sum nú kemur honum til góða. Hann valdi eftir lokið studentsprógv í Føroyum at leggja leiðina til Aberdeen eins og nógvir aðrir av hansara javnaldrum. Eftir lokna útbúgving frá m.a. Robert Gordon University fór hann at arbeiða sum búskaparførðingur við oljubúskapi sum sergrein hjá tveimum heimsins størstu oljufeløgum, fyrst í gótt og væl eitt ár hjá Shell og seinni í heili fimm ár hjá BP í Aberdeen og Stavanger. Heimkomin til Føroya var Tummas Pauli eitt tíðarskeið hjá BP í Havn. Seinni fekk hann so boðið starv í Føroya Banka sum íløguráðgevi.

Hóast oljuvinnan hevur staðið sera frammarlaga, so hevur hetta seinasta árið í Føroya Banka havt ómetaliga stóran týdning fyri Tummas Paula. – Tað hevur verið eitt fantastiskt ár, tí tað er so sera spennandi, inspirerandi og avbjóðandi at arbeiða í fíggjarheiminum. So tað skuldi nakað heilt serstakt til at fáa hann at broyta løgdu kósina inn í pulserandi fíggjarheimin. Og



*Tummas Pauli Mýri arbeiddi í nøkur ár hjá nøkrum av heimsins størstu oljufeløgum í Bretlandi, Shell og BP. Nú gongur leiðin so til eitt minni men kortini stórt oljufelag.*